NSÍ–FS Vágar 4–2 (0–1):

# Søgan endurtekur seg

**Aftur hesa ferð megnaði NSÍ at koma afturíaftur, eftir at FS Vágar í Runavík hevði havt allar møguleikar at vinna**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*



*Í 80 minuttir vórðu steypavinnararnir úr Runavík hildnir á pínubeinkinum, men seinastu løtuna orkaðu undirmannaðu vágamenninir ikki at standa ímóti áhaldandi trýstinum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Setningurin hjá NSÍ í kappingini um løgmanssteypið er í ár at endurtaka endaliga sigurin, sum teir ólavsøkudag í fjør vunnu á HB. Leygardagin settu teir sjøtul á nýggju kappingina, og tað tørnaði væl út. NSÍ vann 4–2.

Men tað stóð einki til leygardagin. Gestirnir vóru úr Vágum, og tað var um reppið, at FS Vágar fór við øllum stigunum. Í fjør var tað eisini um reppið, at FS Vágar vann í steypakappingini í Runavík ímóti FS Vágum. Ta ferðina tókust liðini í fjórðingsfinaluni. FS Vágar var á odda bæði 2–0 og 3–1, men í 90. minutti eydnaðist tað NSÍ at javna til 3–3. Málið skoraði Arnfinn Langgaard, sum nú hevur sett skógvarnar á hillina. Tá var neyðugt við brotssparkskapping, sum Jens Martin Knudsen vann fyri NSÍ.

Leygardagin økti FS Vágar leiðsluna til 2–0, tá ið tað restaði eitt korter. Spælandi FSV venjarin, Jens Erik Rasmussen, setti hol á, tá ið bara níggju minuttir vóru farnir. Eftir langa framlegging frá Jákupi Joensen, sum stóð í málinum, sneiddi framvið fleiri, áðrenn hann setti framvið Jens Martini Knudsen.

Fyritreytirnar hjá FSV versnaðu nógv beinanvegin. Jack Johansen, sum – hóast hann er vinstrabeintur – var á miðvøllinum í høgru, takladi við báðum beinum samlaðum, og tað vísti dómarin reyða kortið fyri. FSV menninir kendu hetta at vera sera bíligt.

Í 2. hálvleiki ráddi hjá FS Vágum um at verja leiðsluna og lúra eftir einsamalla møguleikanum. Tað gekk leingi upp á stás. Vertirnir høvdu bóltin stóran part av tíðini, men teir vóru sera lítið vandamiklir. Tað var nógv meiri gass í, tá ið vágamenn kontraðu. Bólturin varð spældur fram á stóra brasiliumannin, Clayton Soares. Hann vísti góðan førleika at temja og spæla aftur á miðvallararnar, sum síðani løgdu vandamiklu sendingarnar.

Tá ið tað restaði eitt korter, eydnaðist tað aftur hjá FSV. Málskjútti var Clayton Soares eftir snarálop, og so tóktist tað sum um gestirnir sinniliga koblaðu úr.

### Nýtt blóð

Hjá NSÍ var lítið at rópa hurrá fyri. Sjálvandi var tað kærkomið, at tað hóast alt eydnaðist at vinna, men tað mundi órógva, at avrikið var so lítið sannførandi. Mistøkini í uppspælinum vóru nógv, og verjuparturin var alt annað enn heilhjartaður.

Jógvan Martin Olsen tók avleiðingarnar av ússaliga avrikinum. Hann setti tríggjar spælarar við ikki so nógvum royndum – Áka L. Hansen, Rúna Rasmussen og Sonna L. Petersen – á vøllin, og tá kom futturin í, sum í síðsta enda bar fýra mál við sær. FS Vágar var við til at loysa uppgávuna fyri NSÍ menninar við nýggjum íblástri. Tað tóktist sum um ov lítið av luft var eftir, og tá ið NSÍ hevði skorað eina ferð, var sinniliga yvirskotið burtur.

Tólv minuttir restaðu, tá ið Brynjolvur Nielsen fekk nyttu burturúr brotssparki, eftir at Kári Hansen varð feldur. Óli Hansen, sum í ár er fluttur úr álopinum og aftur í miðverjuna, var meistari fyri tveimum teimum næstu málunum. Fyrst stútaði hann í kassan eftir horna, og so rættaði hann skotroynd frá Rúna Rasmussen av.

Sonni L. Petersen staðfesti 4–2 sigurin. Helgi L. Petersen fór ígjøgnum og legði innfyri. Áki L. Hansen royndi seg við skoti, málverjin hálvbjargaði, og so var Sonni fyrstur á.

**NSÍ–FS Vágar 4–2 (0–1)**
0–1: Jens Erik Rasmussen 9.
0–2: Clayton Soares 75.
1–2: Brynjolvur Nielsen br 78.
2–2: Óli Hansen 80.
3–2: Óli Hansen 83.
4–2: Sonni L. Petersen 87.
Reytt kort: Jack Johansen 12.

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen – Brynjolvur Nielsen, Óli Hansen, Messias Perreira, Sjúrður Jacobsen – Bergur Djurhuus,Ian Højgaard, Kári Hansen, Jónstein Petersen – Gert Langgaard, Helgi L. Petersen
**FS Vágar:** Jakup Joensen – Sjúrður Ellefsen, Jóhannis Joensen, Albert Ari Thomassen, Clayton Braga – Jack Johansen, Ruslan Screlea, Jens Erik Rasmussen, Vlad Osipov – Clayton Soares, Eyðfinn Fjalsbak

TB–B68 2–2 (1–2):

# TB tykist væl fyri

**Men hóast heimaliðið var yvirmannað, so eydnaðist teimum ikki at fáa alt ímóti B68**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

TB hevur seinnu árini havt ilt við at standa seg í steypakappingini. Teir hava lagt rygg til fleiri heilt stór tap, og okkurt árið hava teir tikið liðið úr bólkaspælinum. Nýggja bólkaspælið er spildurnýtt, men skal metast út frá avrikinum í fyrsta umfarinum, so tykist tað sum um tvørámenn eru væl betri fyri, enn teir t. d. vóru um hesa tíðina í fjør.

Á Sevmýri ímóti B68 var úrslitið 2–2. Tað mundu teir á heimaliðnum iðra seg um. Serliga tá havt verður í huga, at teir síðsta tíman vóru yvirmannaðir. Øssur Jacobsen, sum var í B68 álopinum, sá reytt, tá ið hann vildi gera dómaran arbeiðsleysan og sjálvur hevndi seg inn á mótstøðumann, sum hevði gjørt fríspark ímóti honum.

B68 hevur fleiri góðar lyklaspælarar. Tað vitna landsliðssessirnir um. Hvussu tað fer at hanga saman hjá toftamonnum sum heild ber ikki til at siga nakað um enn. Men á Tvøroyri var avrikið ikki sannførandi. Í nærdystunum vóru teir ikki nóg avgjørdir, og tað gekk striltið at spæla seg fram til møguleikar. Burtursæð frá málunum báðum, sum teir so at siga fingu burtur úr ongum, høvdu teir tveir møguleikar. Øssur Jacobsen sendi beinanvegin í stólpan, og í síðstu løtu var um reppið, at teir fingu sigursmálið. Tá vóru tað tveir av ungu toftamonnunum, sum vóru uppií. Jóhan Petur Poulsen átti royndina, eftir at innskifti Kristian Anton Andreasen hevði lagt til rættis.

Jóhan Petur Poulsen setti hol á. Hann og ungi TB málverjin, Poul Eli Bærentsen, kapprunnu eftir longum bólti. Toftamaðurin var fyrri og lyfti bóltin upp um málverjan. Dan Mortensen javnaði fyri TB. Eftir stikkbólt í høgru, sneiddi hann framvið nýggja B68 málverjanum, Albert Sævarsson, áðrenn hann sendi í málið.

Fróði Benjaminsen legði B68 framum aftur. Tað gjørdi hann eftir tríkantssamanspæl við Jan Inga Petersen og Jóhan Petur Poulsen.

### Bíðaðu

Eftir at teir høvdu mist ein mann, umskipaðu toftamenn. Øssur Hansen varð tikin aftur á sentrala miðvøllin, Jan Ingi Petersen fór á miðvallarplássið í vinstru, og Súni Fríði Johannesen var einsamallur í álopinum.

TB hevði fleiri nýggjar menn á liðnum. Umframt málverjan vóru tað miðverjarnir Jens Rói Sørensen og Mortan Enni og álopsmaðurin Kaj Roest hevur ikki frammanundan spælt nógv á besta liðnum. Heimaliðið hevði bóltin nógv mesta partin av 2. hálvleiki, og Dan Mortensen og Olivur Abrahamsen vóru eyðsýndir. B68 bíðaði og lúrdi. Men tað eydnaðist ikki hjá TB, sum í 1. hálvleiki fleiri ferðir hevði givið B68 málverjanum høvi at vísa, at hann er góður fongur, at spæla seg fram til fleiri upplagdar møguleikar.

Kortini eydnaðist tað teimum at javna til 2–2. Kaj Roest var málskjútti. Hann varð spældur leysur mitt fyri, har Hans Fróði Hansen og Dánial Hansen annars høvdu gott tak á.

**TB–B68 2–2 (1–2)**
0–1: Jóhan Petur Poulsen
1–1: Dan Mortensen
1–2: Fróði Benjaminsen
2–2: Kaj Roest
**Reytt kort:** Øssur Jacobsen, B68, 30.
**TB:** Poul Eli Bærentsen – Jens Rói Sørensen, Vladimir Matijvic, Mortan Enni – Olivur Abrahamsen, Bárður Dimon, Einar Petersen, Andrass Nolsøe – Dan Mortensen, Kaj Roest, Alexander Knezevic
**B68:** Albert Sævarsson – Bogi Petersen, Hans Fróði Hansen, Dánial Hansen, Jákup Djurhuus – Jóhan Petur Poulsen, Fróði Benjaminsen, Jan Ingi Petersen, Øssur Jacobsen – Súni Fríði Johannesen, Øssur Hansen



GÍ–B36 2–0 (1–0):

# B36 einki at siga í Gøtu



*Við væl skipaðum og effektivum kontra-fótbólti setti GÍ B36 upp á pláss, tá liðini hittust í Gøtu*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Hóast stórar útskiftingar síðani í fjør, so tóktist GÍ við tveimum pólverskum málskjúttum at vera væl fyri í fyrstu týdningarmiklu royndini**

LØGMANSSTEYPIÐ
*Jóannes Hansen*

At siga at talan var um týdningarmikla roynd, tá ið B36 vitjaði í Gøtu, er sjálvandi at taka munnin í so fullan. Í bólkaspælinum er setningurin at samanspæla liðið til landskappingina og at syrgja fyri, at liðið kvalifiserar seg til fjórðingsfinaluna. Men umførini í bólkaspælinum eru týdningarmiklari, enn venjingardystirnir, sum higartil hava verið.

GÍ hevur mist í hvussu so er tveir lyklaspælarar síðani í fjør. Magni Jarnskor og Sámal Joensen eru ikki longur á miðvøllinum, har teir hava havt so sera stóran týdning nógvu tey seinastu árini. Nú er høvuðsleikluturin á miðvøllinum lagdur á Súna Olsen. Hann stóð seg væl leygardagin, og hann hevði ein sera góðan stuðul í Zdzislaw Janik ella Gidek, sum gøtumenn kalla pólverjan.

Tað var týðuligt, at tað er stórt tap fyri B36, tá ið Jákup á Borg ikki er tøkur. John Petersen hevði Carl Høgnesen undir liðini á sær stóran part av tíðini, men teir fingu ikki serliga nógv at arbeiða við. Vinstra síða var mest sum lamin, og tá ið tað onkra ferðina í 1. hálvleiki eydnaðist at leggja innfyri úr høgru, vóru GÍ verjuleikararnir á rætta staðnum. John Petersen hevði í 1. hálvleiki úr meiri ella minni kroystum støðum tvær ella tríggjar royndir, sum fóru framvið málinum.

Tað hekk betri saman hjá heimaliðnum. Men eisini teir høvdu ilt við at spæla seg fram til stórar møguleikar. GÍ legði seg framum, tá ið ein hálvur tími var farin. B36 misti í uppspælinum, Krystof Popczynski, sum var einsamallur heilt frammi, meðan Símun Samuelsen var hangandi álopsmaður, gjørdist leysur, og so var einki at gera hjá Rene Tórgarð.

Bárður á Lakjuni, sum var ytstur á GÍ miðvøllinum í vinstru, hevði tvær góðar royndir í 1. hálvleiki. Í tí fyrra førinum heilfluktaði hann úr spískum og dygst framvið, og í seinna førinum kitlaði langsskotsroyndin úr brotsteigarsamankomingini tvørtræið.

### Umskipaðu

Eftir steðgin umskipaði B36. Heini í Skorini, sum hevði verið á framrættaða sentrala miðvallarplássinum, hagani hann hevði sent onkrar góðar diagonalar sendingar, varð fluttur í høgru, og Julian Johnsson, sum ikki var so eyðsýndur, sum hann plagar at vera, varð fluttur inn á vøllin.

Við rimmar langskoti økti Gidek um leiðsluna, og so royndi B36 at spenna álopsbogan uppaftur meiri. Allan Mørkøre kom inn í álopið, og uppstillingin gjørdist meiri 4–3–3. Men GÍ verjan helt tætt, og fótbóltshugaðu áskoðararnir í Gøtu kundu staðfesta, at tað sær ikki verri út enn ilt, hóast flestu av berandi kreftunum á góða FM liðnum í níti árunum nú eru burtur.

GÍ–B36 2–0 (1–0)
1–0: Krystof Popczynski
2–0: Zdzislaw Janik

GÍ: Jazek Przybylski – Leivur Hansen, Bartal Eliassen, Poul Ennigarð, Jónreid Dalheim – Hans Pauli Samuelsen, Súni Olsen, Zdzislaw Janik, Bárður á Lakjuni – Símun Samuelsen, Krystof Popczynski
B36: Rene Tórgarð – Kenneth Jacobsen, Fróði Clementsen, Pól Thorsteinsson, Arnbjørn Danielsen – Julian Johnsson, Klæmint Matras, Heini í Skorini, Heðin á Lakjuni – Carl H. Høgnesen, John Petersen

## Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

| | d. | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 9 | 8 | 1 | 0 | 547 | 446 | 101 | 26 |
| 2 VÍF | 9 | 6 | 2 | 1 | 492 | 404 | 88 | 22 |
| 3 StÍF | 8 | 4 | 1 | 3 | 476 | 489 | -13 | 15 |
| 4 Stjørnan | 9 | 2 | 1 | 6 | 453 | 457 | -4 | 13 |
| 5 Kyndil | 9 | 3 | 1 | 5 | 508 | 520 | -12 | 13 |
| 6 Neistin | 9 | 4 | 0 | 5 | 435 | 464 | -29 | 13 |
| 7 Tjaldur | 9 | 1 | 0 | 8 | 400 | 531 | -131 | 3 |

1. Deild menn

| | d. | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 9 | 6 | 0 | 3 | 664 | 562 | 102 | 21 |
| 2 StÍF | 8 | 5 | 2 | 1 | 573 | 498 | 75 | 21 |
| 3 Neistin | 9 | 4 | 1 | 4 | 598 | 565 | 33 | 18 |
| 4 Kyndil | 8 | 5 | 2 | 1 | 548 | 530 | 18 | 18 |
| 5 KÍF | 9 | 2 | 2 | 5 | 569 | 595 | -26 | 11 |
| 6 H71 | 9 | 4 | 0 | 5 | 540 | 617 | -77 | 11 |
| 7 Tjaldur | 8 | 0 | 1 | 7 | 498 | 623 | -125 | 4 |

## Máltindarnir

Kvinnur

| | | | |
|---|---|---|---|
| Daiva Tuomaite | VB | 170 | (46) |
| Asta Petrauskiene | StÍF | 159 | (41) |
| Danijela Ercevic | Stjørnan | 154 | (42) |
| Simona Dziugyte | Neistin | 148 | (50) |
| Reda Kurkauskiene | VB | 138 | (19) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 138 | (42) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 130 | (64) |
| Milica Ergic | Tjaldur | 122 | (24) |
| Natasja Stamenkovic | Stjørnan | 114 | (9) |
| Lenka Ribaric | Tjaldur | 112 | (32) |
| Alina Olaru | StÍF | 101 | (8) |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 91 | (8) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 87 | (1) |
| Ileana Manolescu | Kyndil | 82 | (13) |
| Nikolina Eyðbjørnsdóttir | VÍF | 67 | |

Menn

| | | | |
|---|---|---|---|
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 183 | (17) |
| Damir Oros | KÍF | 173 | (38) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 142 | (23) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 139 | (5) |
| Áki Olsen | VÍF | 135 | (10) |
| Morgan Knezevic | Neistin | 127 | (26) |
| Ingi Olsen | VÍF | 119 | (24) |
| Jacob Jónsson | Kyndil | 118 | (7) |
| Áki Mørk | Neistin | 112 | (26) |
| Costin Dumitrescu | StÍF | 97 | (22) |
| Finnur Hansson | Kyndil | 96 | (13) |
| John Zachariasen | VÍF | 93 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 89 | (27) |
| Petur Martin Poulsen | KÍF | 87 | |
| Niels Viggo Niclassen | H71 | 83 | |

## Danska superligan

| | d. | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby | 20 | 10 | 5 | 5 | 40 | 21 | 19 | 35 |
| 2 FCK | 20 | 11 | 6 | 3 | 32 | 20 | 12 | 39 |
| 3 AB | 20 | 5 | 8 | 7 | 25 | 25 | 0 | 23 |
| 4 AaB | 20 | 8 | 3 | 9 | 26 | 29 | -3 | 27 |
| 5 Esbjerg | 20 | 7 | 7 | 6 | 38 | 38 | 0 | 28 |
| 6 FCM | 20 | 8 | 6 | 6 | 30 | 24 | 6 | 30 |
| 7 OB | 20 | 8 | 5 | 7 | 33 | 27 | 6 | 29 |
| 8 Viborg | 19 | 5 | 6 | 8 | 32 | 37 | -5 | 21 |
| 9 Køge | 20 | 7 | 2 | 11 | 32 | 44 | -12 | 23 |
| 10 Farum | 18 | 9 | 0 | 9 | 26 | 35 | -9 | 27 |
| 11 AGF | 19 | 6 | 5 | 8 | 28 | 35 | -7 | 23 |
| 12 Silkeborg | 20 | 5 | 5 | 10 | 26 | 33 | -7 | 20 |

Føroyskir leikarar: Jón Rói Jacobsen (Brøndby), Todi Jónsson (FCK)

Danska 1. deild

| | d. | v | j | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Herfølge | 17 | 12 | 2 | 3 | 40 | 23 | 17 | 38 |
| 2 Frem | 17 | 10 | 3 | 4 | 41 | 26 | 15 | 33 |
| 3 Skjold | 17 | 9 | 4 | 4 | 35 | 18 | 17 | 31 |
| 4 Randers F. | 17 | 9 | 3 | 5 | 37 | 26 | 11 | 30 |
| 5 Fredericia | 16 | 7 | 5 | 4 | 24 | 15 | 9 | 26 |
| 6 Ølstykke | 16 | 7 | 5 | 4 | 40 | 32 | 8 | 26 |
| 7 HFK Sønderj. | 17 | 7 | 5 | 5 | 38 | 32 | 6 | 26 |
| 8 Vejle | 17 | 7 | 4 | 6 | 25 | 27 | -2 | 25 |
| 9 B 1913 | 16 | 5 | 4 | 7 | 20 | 27 | -7 | 19 |
| 10 B 93 | 16 | 5 | 3 | 8 | 23 | 27 | -4 | 18 |
| 11 FC Aarhus | 17 | 5 | 3 | 9 | 26 | 31 | -5 | 18 |
| 12 AC Horsens | 17 | 4 | 6 | 7 | 25 | 30 | -5 | 18 |
| 13 Brønshøj | 16 | 4 | 4 | 8 | 20 | 26 | -6 | 16 |
| 14 Hvidovre | 17 | 4 | 4 | 9 | 19 | 35 | -16 | 16 |
| 15 B 1909 | 17 | 3 | 5 | 9 | 27 | 42 | -15 | 14 |
| 16 HIK | 16 | 4 | 2 | 10 | 17 | 40 | -23 | 14 |

Føroyskir leikarar: Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), John Heri Dam (Hvidovre), Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Johan Byrial Hansen (AC Horsens)